# Almannamálaráðið

Dagfesting: 23. juli 2018
Mál nr.: 18/00633
Málsviðgjørt: DB og HEIP

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 121 frá 15. desember 2014, verða gjørdar hesar broytingar |
| **§ 9.** ...<br>*Stk. 2.* ...<br>*Stk. 3.* Heimahjálp verður veitt borgarum, sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt ella stuðli.<br>*Stk. 4-5.* ... | **1.** § 9, stk. 3 verður “, røkt ella stuðli” broytt til: “ella røkt” . |
| **§ 10.** Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónistum tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at pensjónisturin kann búgva í egnum heimi sum longst.<br>*Stk. 2.* Tænasturnar kunnu fevna um dagtilhald, ergoterapi, fysioterapi, endurvenjing, fyribyrgjandi venjing, viðlíkahaldsvenjing, dagtilboð, mattænastu, umlætting, koyritænastu, vegleiðing o.s.fr. | **2.** § 10 verður orðað soleiðis:<br><br>“**§ 10.** Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónistum og persónum, ið hava varandi sjúku, ið er progressiv og degenererandi, tænastur, ið kunnu stimbra viðkomandi likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at hann kann búgva í egnum heimi sum longst. |

| | |
|---|---|
| | *Stk. 2.* Tænasturnar kunnu fevna um dagtilhald, dagtilboð, ergoterapi, fysioterapi, fyribyrgjandi venjing, mattænastu, umlætting, koyritænastu, vegleiðing o.s.fr.” |
| | **3.** Aftan á § 10 verður sett:<br><br>“**§ 10 a.** Kommunurnar veita endurvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið vegna mistan førleika tørva endurvenjing. Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at fólkapensjónisturin:<br>1) kann búgva heima sum longst, og<br>2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um endurvenjing, undir hesum treytir fyri at fáa endurvenjing og reglur um endurvenjingarætlan og samstarv við almannaverk og sjúkrahúsverk.” |
| | **4.** Aftan á § 10 verður sett:<br><br>“**§ 10 b.** Kommunurnar veita viðlíkahaldsvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið vegna ellisbrek ella sjúku hava týðandi og varandi skert virkisføri, ið hevur týðandi ávirkan á hvussu sjálvhjálpin fólkapensjónisturin er.<br>*Stk. 2.* Viðlíkahaldsvenjing verður veitt við tí endamáli at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar soleiðis, at fólkapensjónisturin:<br>1) kann búgva heima sum longst, og<br>2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.<br>*Stk. 3*. Kommunurnar gera av, hvussu viðlíkahaldsvenjing verður veitt, undir hesum tal av tímum<br>til viðlíkahaldsvenjing. Innan játtanarskeiðið endar, skulu kommunurnar hava tikið nýggja avgerð um viðlíkahaldsvenjing.” |
| **§ 12.** Kommunurnar kunnu taka avgerð um at veita fólki samsýning, sum átaka sær at | **1.** § 12, stk.1 verður orðað soleiðis: |

| | |
|---|---|
| ansa fólkapensjónisti heima, sum hevur tørv á støðugari røkt og hjáveru.<br>*Stk. 2-5.* ... | "Kommunurnar kunnu taka avgerð um at veita fólki samsýning, ið átaka sær at ansa heima:<br>1) fólkapensjónisti við ellisbreki ella varandi sjúku, sum hevur tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið, ella<br>2) persóni við varandi sjúku, ið er progressiv og degenererandi, og sum hevur tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið. |
| **§ 14.** Røktarheim og eldrasambýli eru bústaðir, ið hýsa fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.<br>*Stk. 2.* Í serligum føri kann røktarheim ella eldrasambýli eisini hýsa øðrum røktarkrevjandi persóni enn fólkapensjónisti.<br>*Stk. 3.* Kommunurnar skulu boða Almannaverkinum frá, tá fólkapensjónistur fær bústað sambært stk. 1. | **5.** § 14 verður orðað soleiðis:<br><br>"**§ 14.** Røktarheim og eldrasambýli eru bústaðir, ið hýsa:<br>1) fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið,<br>2) persónum við varandi sjúku, ið er progressiv og degenererandi, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.<br>*Stk. 2.* Í serligum føri kann røktarheim ella eldrasambýli móti gjaldi frá landinum hýsa persóni, ið hevur tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið vegna týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar.<br>*Stk. 3.* Kommunurnar skulu boða Almannaverkinum frá, tá fólkapensjónistur fær bústað, sambært stk. 1, nr. 1" |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. |